Bárður Nielsen fremur lógarbrot:

# Seinasta dømið um politiska rættarloysið

ÓLI JACOBSEN



Seinasta dagin í fiskimannafelagnum fekst enn eitt dømi um almenna politiska rættarloysið í føroyska samfelagnum.

Henda søgan snýr seg um val av Avgjalds- og skattakærunevndina, sum avgreiðir kærur um avgerðir, sum verða tiknar av Toll- og Skatt. Hetta er ein fimm mannanevnd, og ein av teimum verður valdur eftir tilmæli av fakfeløgunum.

Nevndin skuldi veljast av nýggjum pr. 1.januar 2007 fyri eitt fýra ára skeið, og í hesum sambandi fingu fakfeløgini í desember bræv frá Fíggjarmálaráðnum um at geva tilmæli um lim í nevndina.

Seks fakfeløg senda síni tilmæli. **Trý** av teimum mæla til at velja Ingeborg Vinther. Hesi trý feløgini umboða groft roknað **10.000** limur. **Eitt** felag mælir til at velja sama nevndarlim aftur, og hetta felag umboðar groft roknað **1.000** limir.

Við hesi innstilling skuldi tað verið ein sjálvfylgja, at landsstýrismaðurin velur tann sum hevur trý feløg og 10.000 limir aftanfyri seg.

Men hann ger tað beint mótsetta, nevniliga at útpeika uppskotið frá einum felag við 1.000 limum aftan fyri seg sum nevndarlim.

Grundgevingar fyri fyri hesi avgerð er eisini sera avdúkandi fyri demokratiska hugburðin hjá Bárð, at tað er hann og ikki fakfeløgini sjálvi, sum skulu avgera hvør ið skal umboða fakfeløgini.

Ein grundgeving er tann, at sitandi nevnd hevur játtað at taka við afturvali. Hetta er sjónarmið kann bert hava áhuga fyri teir limir, sum landsstýrismaðurin einsamallur tekur avgerð um. Tað kann í hvussu er ikki telja í samband við limin, sum skal umboða fakfeløgini.

Hin grundgevingin er, at nevndin hevur virkað væl. Her skal eisini sigast, at ein slík meting hjá landsstýrismanninum kann í hvussu er ikki hava týdning fyri, hvør ið skal umboða fakfeløgini í nevndini.

At nevndin hevur virkað væl er tað fleiri meiningar um. Tá FF gjørdi sína innstilling gjørdu vit vart við, at vit settu okkum ímóti, at forkvinnan í nevndini, Turið Debes Hentze, varð afturvald, tí vit høvdi ikki álit á henni. Vit sendu eisini væl undirbygdar grundgevingarnar fyri hesum, og eru tær at finna í míni seinastu ársfrágreiðing.

Her varð m.a. víst á, at kærunevndin hevur staðfest, at tað ongan týdning hevur fyri hana, um Toll og Skatt í síni framløgu av einum máli nýtir ósannindi ella um hon í heila tikið lýsir málið, sum er til viðgerðar.

Tá vit so sjálvir lýstu málið, eftir at Toll og Skatt hevði noktað at útvega tilfar, sum nevndin hevði biðið um, boðaði kærunevndin frá, at framløgdu upplýsingarnir kortini ikki týdning fyri viðgerðina av málinum uttan at hetta var grundað á nakran hátt.

Bárður Nielsen metir nevndina at virka væl, tá hon á slíkum grundarlagi gevur honum viðhald og tí vil hann hava nevndina at halda fram.

Úrslitið er, at Bárður hevur sett til viks eina heilt greiða innstilling frá fakfeløgunum við nevndu óviðkomandi grundgevingum. Fyri fakfeløgini merkir hetta, at tey eins væl ongan lim høvdu havt.

**Eingin skipað mannagongd**

Vit síggja, at Bárður ger í hesum málinum sum tað, sum passar honum, við at sjálvur at seta tað umboð fyri fakfeløgini, sum hóskar í hansara kramm. Hetta greitt brot á eina skipaða mannagongd, har hann sjálvsagt ongan annan reellan møguleika skuldi havt enn at fylgja eini greiðari innstilling.

Tá ein landsstýrismaður so greitt fremur brot á eina greiða lógaráseting, hvat kann hann so ikki finna uppá í øðrum málum! Og hvat kunnu vit tá vænta av restini av politisku skipanini?

Løgmaður hevur eftirlit við landsstýrismonnunum. Hvat sigur hann til eina mannagongd sum hesa?

Dokumentir:

1.

**Skatta- og avgjaldskærunevndin .**

**§ 22.** Skatta- og avgjaldskærunevndin viðger toll- og skatta- og avgjaldskærur.

*Stk. 2.* Í Skatta- og avgjaldskærunevndini eru 5 av landsstýrismanninum tilnevndir limir. 2 av limunum skulu vera lógakønir, 1 skal vera roknskaparkønur, 1 skal umboða arbeiðsgevarafeløgini og 1 verkamannafeløgini. Landsstýrismaðurin tilnevnir umboðini fyri arbeiðsgevarafeløgini og verkamannafeløgini eftir tilmæli frá feløgunum.

Henda lógargrein áleggur heilt greitt landsstýrismannin at tilnevna umboð "eftir tilmæli frá feløgunum". Her skuldi eingin ivi um at landsstýrismaðurin við fleiri tilmælum eigur at seta tann, sum hevur størstu undirtøkuna. Men fyri at tryggja nevndini "arbeiðsfrið" hevur hann valt at seta nevndarlim, sum hóvar honum, og tekur hann tískil fakfeløgini av ræði.



Fíggjarmálaráðið

Hesi tilmæli eru innkomin til val av limi í Skatta- og avgjaldskærunevndina:

Føroya Arbeiðsgevarafelag:
Niclas Joensen sum lim (at halda fram)

Starvsmannafelagið:
John Kjær, Hoyvík sum lim og sum varalim Ingrid Henriksen (at halda fram)

Føroya Fiskimannafelag:
Ingeborg Vinther sum lim

Havnar Arbeiðsmannafelag:
Ingeborg Vinther sum lim

Føroya Arbeiðarafelag:
Ingeborg Vinther sum lim

Heilsuhjálparafelag Føroya:
Ása Olsen, Tórshavn sum lim

Maskinmeistarafelagið:
Pauli Klakkstein sum lim (at halda fram)

Argir, tann 09. januar 2007
Borgarhjørt kragesteen

Sitandi nevnd hevur játtað at taka við afturvali.

Nevndin hevur virkað væl, og út frá tí havi eg samtykt at verandi limir og varalimir halda fram eitt 4-ára skeið aftrat.

Argir, tann 10. januar 2007
Bárður Nielsen, landsstýrismaður

Traðagøta 39 • Postsmoga 2039 • 165 Argir
Telefon 35 20 20 • Telefax 35 20 25 • E-mail: fmr@fmr.fo

2.

Hetta er skjalið sum prógvar, hvussu Bárður Nielsen tilvitandi setir eitt greitt tilmæli hjá fakfeløgum til viks í stríð við galdandi lógávu.

# Gott Jógvan á Lakjuni – og tó

HEÐIN MORTENSEN
stýrisformaður
Kommunusamskipan Føroya
www.ksf.fo



**Kommunusamskipan Føroya fegnast um, at Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, vil hava kommunurnar at umsita fólkaskúlan. Men ávísar ætlanir, sum ikki eru hansara egnu, skurra tíverri almikið.**

Í frágreiðingini um fólkaskúlan, ið landsstýrismaðurin hevur latið løgtinginum til aðalorðaskifti, mælir landsstýrismaðurin nevniliga til, at fólkaskúlin verður lagdur út til kommunurnar at umsita. Hetta er í samsvari við PISA-tilmælini, og hetta er eisini í samsvarvi við krøvini frá limakommunum í KSF.

Eingin ivi er um, at ógreiða uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum land og kommunur viðvíkjandi fólkaskúlanum er ikki til gagns fyri fólkaskúlan.

Í øllum grannalondum okkara er grundskúlin fyri fleiri árum síðan lagdur út til kommunurnar at umsita. Tað er ikki uttan orsøk. Tað er úti í kommununum, at skúlin virkar, og tað er úti í kommununum, at einstaki tørvurin verður best nøktaður. Kommunurnar kenna best tann staðbundna tørvin og kunnu skjótari enn nøkur miðfyrisiting skipa tær hóskandi tænasturnar.

Kommunurnar í Føroyum eiga at fáa størri ábyrgd av fólkaskúlanum – serstakliga viðvíkjandi ítøkiliga innihaldinum og virkseminum í skúlanum.

Tað er tí gleðiligt at staðfesta, at landsstýrismaðurin tekur fult undir við hesum. Hann vísir í frágreiðingini m.a. á, at ábyrgdin skal liggja nærri borgaranum, at kommunali myndugleikin skal hava størri ávirkan á viðurskiftini, og at tað skulu vera kommunurnar sjálvar, sum avgera, hvussu skúlaskapurin í kommununi verður skipaður og raðfestur út yvir tey lógarásettu minstukrøvini.

Hetta hevur alstóran týdning – at til ber úti í kommununum at skipa ein betri skúla enn tað, sum er ásett í lógini. Tann størsta vinningin fær tann einstaki skúlanæmingurin, ið fær eitt tilboð, sum er munandi betri sett saman til serstaka tørvin, og sum harafturat er í samsvari við fólkaviljan á staðnum.

**Skurrið**

So skuldi alt verið gott – her er bara at seta í verk útleggingina av fólkaskúlanum til kommunurnar.

Men tíverri hava ymsar ørkymlandi ætlanir snikt seg inn í frágreiðingina, og sum neyðugt er at ávara ímóti.

Tí aftaná greiða málið um at leggja skúlan út til kommunurnar, verður sett upp eitt alternativt uppskot um at skipa skúlan í eina meginfyrisiting og eitt tal av økisfyrisitingum kring landið. Hetta er eitt kent embætismannauppskot frá einum av Visjón 2015-strategiskjølunum, og sum KSF als ikki tekur undir við.

Høvuðsatfinning okkara er, at uppgávu- og ábyrgdarbýtið als ikki verður greiðari. Meðan meginfyrisitingin er Mentamálaráðið, so eru økisskúlafyrisitingarnar í veruleikanum eisini Mentamálaráðið.

Tað er nevniliga landsstýrismaðurin í mentamálum, sum skal seta leiðaran fyri økisskúlafyrisitingina. Og umvegis leiðaran skal Mentamálaráðið framhaldandi detailstýra alt undirvísingarvirksemið í skúlunum líka frá ítøkiliga tíma- og lærugreinabýtinum til starvsfólkanormeringina v.m.

Tað merkir, at kommunurnar onga sum helst ávirkan koma at hava á skúlan. Tær fáa ikki eingang heimild at seta í starv hægsta leiðaran fyri teirra egnu skúlar. Kommunustýrislimirnir og borgararnir mugu bara hyggja at, meðan teirra skúli skorar botnkarakter í PISA-kanningunum framyvir.

Hetta er í veruleikanum ein ógvuslig ómynduggerð bæði av kommununum og borgarunum. Úrslitið verður ein skúli, sum als ikki tekur støði í staðbundna tørvinum, og har eingin ábyrgdarkensla er til staðar – og hetta er neyvan ætlanin hjá landsstýrismanninum.

Skurrið steðgar tíverri ikki her. Ætlanin er at skipa eina royndarkommunu til tess at staðfesta, um tað er rætt at leggja skúlarnar út. Serliga er ætlanin í hesum royndarskeiði at fáa størri samstarv millum barnagarð og skúla.

Tað ljóðar harmleyst, men KSF mælir staðiliga frá at ganga hesa leið. Allar kommunur eiga í útgangsstøðinum at hava tær somu lógarásettu uppgávurnar. Tað er eisini umráðandi, at allar kommunur hava somu royndir at byggja víðari á.

Nú hevur landsstýrismaðurin valt at peika á eina ávísa kommunu sum vælegnaða royndarkommunu. Hvør grundgevingin fyri hesum vali er, er trupult at meta um.

Tað er tó greitt, at verður henda royndarskipan sett í verk, so er tað upp til eina meira ella minni tilvildarliga kommunu at prógva, at tað ber til hjá kommununum at umsita skúlan við so mikið góðum úrslitum, at allar kommunurnar skulu umsita skúlan.

Men kanska ætlanin hjá onkrum í veruleikanum er at prógva, at tað ikki ber til?

Okkara áheitan á landsstýrismannin er at halda seg til sítt greiða – og rætta – mál, sum er at leggja skúlan út til kommunurnar at umsita sum skjótast, og annars at sløkkja fyri skurrinum beinanvegin.

**Verður fólkaskúlin betri?**

KSF hevur sett sær sum mál, at fólkaskúlin saman við musikkskúlaskipanini, frítíðarundirvísingini og skúlabókasøvnunum verða løgd út til kommunurnar at umsita í 2008.

Hetta merkir, at kommunurnar skulu fíggja, umsita, raðfesta, avgera og fremja alt virksemið á skúlaøkinum sambært ásettum lógum, reglum, minstukrøvum og – ikki minst – sínum egnum ynskjum.

Frammanundan umsita kommunurnar dagstovnaøkið. Tað er tí fyri tað fyrsta bert kommunurnar, sum kunnu skipa og tryggja eina gevandi og mennandi innskúling, har pedagogar og lærarar virka á báðum økjum og sostatt fylgja tí einstaka barninum yvir fleiri ár.

Fyri tað næsta er tað bert kommunurnar, sum kunnu

*Framhald á næstu síðu*